# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BORGARLIGA MJØRKATÁMIÐ

Tað tykist sum um Javnaðarflokkurin nú er vaknaður sum vil kaldan dreym, nú veljarakanning gevur flokkinum vánaligasta úrslitið síðani 1932. Valúrslitið seinast var annars katastorfalt vánaligt, tí burtursæð frá vanlukkuvalinum í 1994, so hevur flokkurin ikki verið so lítil síðani 1954.

Tað gav at býta hjá mongum fakfelagsfólki, nú Javnaðarflokkurin við fíggjarmálaráðharranum á odda hótti fakfeløgini við eini null-loysn – at eingin lønarvøkstur skuldi vera yvirhøvur.

Kanska er tað samfelagsbúskaparliga skilagott at halda so mikið aftur, men um tað eru búskaparfrøðingar ikki samdir. Javnaðarflokkurin hevur einaferð roynt at skorið av almennu lønunum við 8,5 prosentum, og tað kostaði flokkinum helmingin av tingmanninginum. Nú roynir hann seg við eini 0-loysn, og tað kostar gott nokk ikki helvtina av tingmanningini, men »bara« ein triðing - sambært veljarakanningini.

Hvat er so til ráða at taka? Jú, tað er at seta hart ímóti hørðum. Sama dag sum veljarakanningin varð kunngjørd sendi Javnaðarflokkurin løgmanni bræv, har flokkurin boðar frá, at hann ikki longur stendur við ta avtalu, sum gjørd er í sambandi við lønarkarmin. Flokkurin vil hava, at kompenserað verður fyri lønarhækkingina á fíggjarlógini.

Eftir øllum at døma tekur flokkurin nú eitt slag fyri at tekkjast fakfelagsrørsluni – hesi rørslu, sum í sínari tíð var grudstøðið undir flokkinum. Men tað er hon ikki meira. Formaður Javnaðarfloksins, sum fyri nøkrum árum síðani proklameraði, at stættarstríðið er av, segði á seinasta landsfundi floksins, at so leingi, sum Javnaðarflokkurin er í samgongu við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, so er flokkurin *»í einum borgarligum mjørkatámi, sum ger tað trupulult hjá okkara fólki at kenna okkum aftur«*.

Formaðurin sigur tað sjálvur, at veljarin kennir ikki mun á Fólkaflokkinum/Sambandsflokkinum og Javnaðarflokkinum. Og tað er júst tað, sum tey nú aftur eru komin í



tankar um. Tí verður semjan um »uppsagnir-fyri-lønarhækking« brotin. Løgmaður hevur fingið eitt ultimatum: *»At reka fyrilitarleysan borgarligan sparipolitikk saman við Fólkaflokkinum ella at taka neyðug stig til at tryggja føroyska vælferðarsamfelagið saman við Javnaðarflokkinum.«*

Sambært hesum hevur løgmaður tveir møguleikar: At banka Fólkaflokkin og Laksafoss-veingin í Sambandsflokkinum upp á pláss, so partarnir semjast við Javnaðarflokkin. Ella verður samgonguslit.

Javnaðarflokkurin hevur spent bogan so nógv, at hann kann ikki slaka – uttan at verða gjørdur totalt til láturs.

## Vilja aftur tekkjast fakfelagsrørsluni



# Jólaskipið kemur í dag

Í dag klokkan 15 kemur Jólaskipið á Havnina. Jólamenninir siga í tíðindaskrivið, at Jólaskipið er riggað til at koma til.

– Vit jólamenn og vætrar gleða okkum øll at koma í Vágsbotn og heilsa upp á tykkum øll, og til at lurta eftir GHM, sum spælir hugnaligan jólatónleik. Tað er altíð so hugnaligt, og vit hava posan fullan av góðgæti. Gávurnar, ja tær mugu bíða til jólaaftan, tað sigur elsti jólamaðurin hjá okkum.

– Vistu tit, at nú hava vit fingið teldu? Ein vættur helt fyri, at tað var so snilt hjá fólki, at tey kundi síggja, hvussu veðrið fór at vera, so nú hava vit hugt bæði á DMI og Yr og Theyr. Men tey siga ikki heilt tað sama. Hvussu veit man so, hvat passar? Fyrr var altíð onkur jólaomma, sum segði, at giktin visti, hvussu veðrið fór at verða, siga jólamennir.

Men teir halda ikki, at tað bilar, hvussu so veðrið verður, tí í ár hevur jólaskipið fingið hjálp frá Bjargingarbátinum LÍV, so her er eingin vandi á ferð, og vit fara eisini at klára at heilsa uppá børnini í Nólsoy á veg til Havnar. Og teir halda fram:

»Og síðani verður, sum tað altíð hevur verið. Vit fara niðan í býin at heilsa upp á vinir og kenningar. Vit hava hoyrt, at ein gamal jólamaður er í einari jólasmáttu beint við gongugøtuni. Har fer at verða nógv annað at síggja. Jólatræið er so stórt sum ongantíð við túsund perum sum lýsa um allan miðbýin, og har verður eisini tónleikur og kór. Kanska sleppa vit eisini at keypa onkra gávu við heim til jólaommuna, tað dámar henni.

Kanska síggja vit eisini teg. Tað hevði verið stuttligt. Úr miðbýnum fara vit í hvussu so er at ynskja tær og øllum í Føroyum, børnum og vaksnum, eini GLEÐILIG JÓL!«



## Taki hattin av fyri Rósu

ELSA M. DAVIDSEN
KJAK Á SÍÐU 121



## Ein kjansur

ZAKARIAS WANG
KJAK Á SÍÐU 22

# Situatiónsfornemmilsi – ella arrogansa?



Løgtingið hevur við aðru viðgerð loyvt Fíggjarmálaráðnum at brúka 900.000 krónur til eina nýggja úthurð í glæstriborgini hjá ráðnum úti á Argjum.

Sjálvandi er tað ikki gott, um tað gýsur og fýsur gjøgnum dyrnar í Fíggjarmálaráðnum. Men bara tað at eitt aðalráð - enntá við fíggjarmálaráðharranum á odda - kann finna upp á at biða løgtingið um eina eykajáttan upp á slaka millión til eina nýggja úthurð í hesum døgum, tað sigur, at ómetaliga lítið samband er millum býrokratarnar í Fíggjarmálaráðnum og fólkið á gøtuni.

*Góði Jóannes Eidesgaard! Fá onkran at bøta um hurðina, og brúka hasa slaku milliónina til at »tryggja føroyska vælferðarsamfelagið«. Sambært løgmanni skulu tit finna seks milliónir afturat fyri at liva upp til tíni egnu krøv. Droppa tí hasa hurðina – so eru bara 11 milliónir eftir at finna til tess at bjarga føroyska vælferðarsamfelagnum.*

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814, aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*